# Brandur Enni við nýggjari fløgu



**Tann 5. apríl gevur Brandur Enni eina nýggja fløgu út. Hendan fløgan hevur verið í gerð síðan seinasta summar, og í hesum sambandi verður eisini eitt sjónbandalag framleitt**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Sunnukvøldið var Platform karmur um ein part av upptøkum til eitt sjónbandalag, sum skal gevast út saman við nýggju fløguni hjá Brandi Enni.

Frá tíðliga á morgni til seint á nátt varð arbeitt við at fáa allar upptøkurnar í kassan hjá tí føroyska filmsliðnum frá Media Music í Danmark, sum var komið til Føroya í hesum sambandi.

Høvuðspersónur var sjálvandi Brandur sjálvur, sum í sjónbandalagnum bjóðar nógv lív, eina góða søgu og ikki minst góðan og frískan tónleik.

## Nógv fólk

Um 120 fólk vóru knýtt at øllum rokilsinum sunnukvøldið. Runt um beinini á hvør øðrum runnu sminkøsur, stylistar, frisørar, barrvørðar, dansigentir og nógvir, nógvir statistar.

Statistarnir vóru øll ung fólk, sum vóru funnin í onkrum av fólkaskúlunum í Havn. Hesi ungu skuldu í fleiri tímar dansa, smílast og hugna sær. Og sjálvandi gera, júst sum maðurin við mikrofonini bað tey.

Maðurin við mikrofonini var Eyðfinn Jensen, og leikstjórnaði hann øllum upptøkunum hetta kvøldið.

Onkur genta og onkur drongur vórðu eisini paraði saman til sjónbandið, men tað bilti einki. Hetta var bara stuttligt...

Tá klokkan leið móti midnátt, vóru tey flestu vorðin eitt sindur troytt og fóru heim at leggja seg. Men nøkur vóru tó eftir, og hildu tey á eina løtu afturat.

## Røkka útum Føroyar

Steintór Rasmussen, stigtakari og samskipari, sigur, at endamálið er at gera eina góða fløgu, sum kann standa á jøvnum føti við eisini útlensk tónleikanøvn.

Teir flestu av teim allarbestu tónleikarunum í Føroyum hava verið við til at framleitt fløguna, og fólkini aftanfyri sjónbandalagið hava eisini sínar royndir.

- Og tá vit seta alt hetta saman við Brandi, so hava vit eitt sera gott konsept, sigur Steintór.

- Eingin sigur, at føroyskur tónleikur einans skal verða góður í Føroyum, so við hesum konseptinum gera vit eina roynd í eisini at røkka útum klettarnar. Og sjálvur meti eg, at Brandur hevur júst tað, ið skal til fyri at sláa ígjøgnum uttanlands. So vit hava góðar vónir, greiðir Steintór frá.

## 5. apríl

Tann 5. apríl kemur so spennandi fløgan út á marknaðin, og í hesum sambandi verður eisini skipað fyri tveimum konsertum í Norðurlandahúsinum. Tann eina verður fyri innbodnum, meðan hin verður almenn, so at øll fáa møguleikan at uppliva Brand Enni live við øllum teim nýggju løgunum av fløguni.

Fløgan kemur at innihalda tilsamans 14 sangir, harav 6 eru føroyskum og 8 á enskum máli.






Bústevnan
Hús & Innbúgv



· Bygging
· Umbygging
· Havaarbeiði
· Umvæling
· Køkar
· Vindeygu
· Hurðar
· Fígging
· Tryggging
· VHS
· Hvítvørur
· Møblar...

...og alt sum hevur við hús at gera hava møguleika at stilla út!

Lat ikki henda møguleikan gleppa tær av hondum. Verð við á bústevnuni Hús & Innbúgv

Setið tykkum í samband við okkum!

HÚS & INNBÚGV




# Tveir finalistar afturat



*Vinnarar av umfarinum í Hvalba gjørdust Rakul Olsen og Vígdis Berg*

**Leygarkvøldið fór næsta umfarið av Ársins Songrødd av bakkastokki, hesuferð í Hvalba. Vinnarar av hesum umfarinum gjørdust Rakul Olsen og Vígdis Berg, báðar 16 ára gamlar.**

ÁRSINS SONGRØDD
*Ragnhild Ellingsgaard*

Um 300 fólk vóru til staðar, tá farið var undir næsta umfarið av Ársins Songrødd 2002.

5 luttakarar høvdu meldað seg til kappingina, og av hesum 5 skuldu tveir finalistar finnast, sum so skulu verða við í finaluni, sum verður í Badmintonhøllini tann 29. juni í ár.

## Góð evni

Nummar eitt hetta kvøldið gjørdist 16 ára gamla Rakul Olsen frá Hvalba, sum sang sangin Try Again hjá Aaliyah.

Rakul var ikki einsamøll á pallinum, men framførdi saman við 4 dansigentum eitt framúr flott show, sum ongan iva lat verða eftir hjá dómarunum.

Nummar tvey gjørdist 16 ára gamla Vígdis Berg frá Hovi við sanginum Here With Me hjá Dido.

Frá fyrireikarunum frætta vit, at talan er um tvær sera dugnaligar gentir, sum uttan iva hava ein góðan møguleika innan føroyska tónleikaheimin.

## Næstu ferð í Klaksvík

Enn eru bert kvinnuligir finalistar funnir, men í næsta umfarinum, sum verður hildið í Klaksvík tann 22. mars, verður eisini onkur drongur til.

Fyri fáum árum síðani var tað sera trupult at fáa so frægt av luttakarum við, at skipast kundi fyri slíkum tiltøkum.

Men í ár er longu fult teknað til nærum øll umførini, og sama er galdandi fyri umfarið í Klaksvík.

## 11 sangir

Til innleiðandi umførini hava luttakarnir 11 sangir at velja ímillum.

Á pallinum framføra tey ein sang, og finna dómararnir út frá hesum fram til vinnaran.

Sangirnir, ið luttakarnir kunnu velja ímillum, eru :

1. Britney Spears
   I'm A Slave For You
2. Aaliyah
   Try Again
3. Dido
   Here With Me
4. Atomic Kitten
   Eternal Flame
5. N Sync
   Pop
6. Kylie Minoque
   Can't Get You Out Of My Head
7. Follow Me
   Uncle Kracker
8. Crasy Town
   Butterfly
9. Moulin Rouge
   Lady Marmelade
10. Ricky & Christina
    Nobody Wants To Be Lonely
11. Herhams House Band
    Country Roads


Sosialurin & Internet Sosialurin

ÓKEYPIS





Nú Sosialurin fyllir 75 ár í ár, so ber tað til at gerast haldari av Sosialinum ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum. Samstundis loyva vit okkum at senda tykkum eitt uppkrav fyri aprílársfjórðing.

Tíðindablaðið
Sosialurin
BOX 76
110 Tórshavn

Undirritaði ynskir at fáa Sosialin sendandi ókeypis í mars mánað og fær uppkrav fyri aprílársfjórðing sendandi

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Navn:
Bústaður:
Post nr., bygd, býur:
Telefon
e-mail:
Undirskrift: